# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Annað skinn um bak

Tað er ov nógv avgjørt at siga, at landsstýrissamgongan er at líkna við róðurleysa skútu. Heldur kundi ein kanska sagt, at samgongan minnir um skip, har allir yvirmenninir vilja vera skiparar, og manningin tí ger, sum tað passar henni. Vit liva tíbetur í fólkaræði, men fólkaræði merkir ikki, at tað stendur einum hvørjum frítt at bera seg at, sum honum ella henni lystir. Vit hava, serstakliga í meirilutastýri, nakrar spælireglur, sum partarnir mugu halda. Gera teir ikki tað, so verður slingur í kósini og álitið fer. Tað var hetta, sum vit sóu undir fíggjarlógarviðgerðini og sum partar av samfelagnum nú svíða fyri. Vanliga mannagongdin er, at eitt samt landsstýri við landsstýrismanninum í fíggjarmálum leggur fram eitt uppskot til fíggjarlóg. Hetta uppskot skal vera væl og virðiliga viðgjørt innanhýsis í samgonguni og í sjálvum landsstýrinum, soleiðis at samgongan hevur felags stev, tá uppskotið einaferð kemur á tingborð.

Hetta við felags stevi ella felags gongulagi merkir sjálvsagt ikki, at eitt løgting er bundið av einum hvørjum landsstýrisuppskoti. Tað stendur sjálvsagt løgtinginum frítt at broyta eitthvørt uppskot, sum kemur frá landsstýrinum. Men hinvegin má tað vera eitt minstamát av sambandi og samanhangi millum politikkin hjá landsstýrissamgongu og ta fíggjarlóg, sum samgongulimir samtykkja á tingi. So hevur ikki verið við tí figgjarlóg, sum nú er í gildi. Upprunaliga uppskotið varð broytt nógv, og hesar broytingar hava havt so óhepnar fylgjur, at stórt órógv hevur eftirfylgjandi verið serstakliga á almanna- og útbúgvingarøkinum. Henda órógv ávirkar politiska stabilitetin í samgonguni.

Tað eru bleytu økini, sum hava staðið fyri skotum. Veljarin sigst vera stuttmintur. Hinvegin hava øll valla gloymt, hvussu stóran dent flokkar í seinasta valstríði løgdu á bleytu virðini. Almenningurin hevði veruliga orsøk at trúgva og halda, at nú fór broyting at koma í politisku raðfestingarnar. Vit skulu ikki skuldseta nakran fyri lyftisbrot, men hondina á hjartað: er ikki eitt sindur torført at fáa eyga á bleytar raðfestingar á galdandi fíggjarlóg?

Hví eru vit komin út í hesa støðu? Svarið kann valla vera annað enn tørvandi leiðsla og væntandi samskipan av politiska arbeiðinum innan samgonguna. Her má vend koma í, um hesari ABC samgonguni skal verða lív lagað. Tað er synd at siga, at samgongan á tingi hevur verið loyal móti sínum ráðharrum. Men hetta hava løgmaður og landsstýrislimir í stóran mun sær sjálvum fyri at takka. Tey skulu leiða og samskipa, miðla og greiða frá, kunna og gera sítt politiska heimaarbeiði og ikki minst ansa eftir teimum politisku hjartabørnunumm, sum tey lata løgtinginum at goyma eina tíð.
Her kann ikki hava verið nóg væl ansað eftir, og tað bøtir ikki um trúvirðið bara at skylda uppá fíggjarnevnd og løgting. So einfalt er hetta mál ikki, og løgmaður og manning hansara mugu tí taka annað skinn um bak, meðan tíð er.

**Sosialurin**

## Vælnøgda fjøldin

**VILLADS BØGESVANG**

Klokkan átta um morgunin ringja skúlaklokkur um alt landið inn, og í flestu bygdum fara børn í skúla.

Vit liva í einum sera góðum samfelagi, har øll hava møguleika fyri at ganga í skúla og fáa sær eina útbúgving.

Nógvar útbúgvingar eru í at velja, og um vit ynskja eina aðra útbúgving, enn vit kunnu fáa her á landi, so kunnu vit søkja inn á lærdar háskúlar í t.d Danmark á líka fót við onnur í danska ríkinum.

Um børnini gerast sjúk, so hava vit eisini møguleika fyri at verða heima frá arbeiði og sjálv ansa eftir teimum. Gerst neyðugt at fara á sjúkrahús, so eru fleiri í at velja, heili trý hava vit og gerst neyðugt, so hava vit altíð eina opna billett til Ríkissjúkrahúsið í København. Ja, vit hava so nógv gott og hava so góðar møguleikar, at sjálvt um vit bert eru umleið 50.000 fólk, so eru vit so at siga ikki avmarkað av hesum - og í veruleikanum er ikki nógv annað enn veðrið at finnast at viðhvørt.

Eg haldi, at vit ofta hava hug at isolera okkum, eingin skal bestemma yvir okkum og eingin skal bestemma, hvat vit skulu halda og serliga gera. Hetta er als ikki rætt! Vit liva í einum samfelag, sum er partur av einum heimssamfelag, og tí er neyðugt at tillaga seg øðrum. Um vit ikki vilja tað, so er tað sjálvandi eitt val, og so noyðast vit at betala tann prísin, sum tað nú einaferð fer at kosta - eg meini so við, at um t.d okkara kundar ikki vilja keypa fiskin frá okkum, um vit drepa grind, so noyðast vit at gera upp - hvat hevur størst týdning. Eg haldi, at okkara bestu møguleikar liggja í at økja um samstarvið við umheimin. Vit eru í dag partur av danska ríkinum og gevur tað okkum nógvar møguleikar, sum vit annars neyvan høvdu havt. Sum áður nevnt eru skúlar og Ríkissjúkrahús nøkur dømi um hetta, og seinast eru bankapakkarnir eisini eitt gott dømi!

Tori illa at hugsa um, at vit kanska høvdu verið í somu ræðuligu støðu, sum íslendingar eru í í dag, um ikki okkara peningastovnar høvdu verið uppi í bankapakkunum úr Danmark.Vit kunnu tó ikki bara hugsa um ríkisfelagsskapin sum nakað fíggjarligt! Tað eru eisini sterk søgulig og mentanarlig bond landanna millum.

Vit hava uttan iva møguleika at koma nærri ES og harvið fáa møguleika at forhandla okkum til so góðar umstøður sum gjørligt. Åland hevur fingið eina varandi avtalu við ES um tollfríu søluna, sum teir liva væl av, tí ferðavinna er teirra høvuðsvinna. Okkara høvuðsvinna er fiskivinnan - og skuldi verið løgið, um vit ikki kunnu fáa eina lagaliga avtalu um fiskivinnuna á sama hátt sum Åland fekk um tollfríu søluna.

Sum sagt, so er tíð uppá, at vit verja tað samstarv, vit hava í dag og royna at víðka um hetta.Hetta er jú eitt samstarv - talan er ikki um, at onnur hava vald á okkum.

Vit hava eitt fólkavalt stýri, men er hetta kanska eitt veikt demokrati. Hyggja vit t.d eftir grannalondunum hjá okkum, so eru flestu lógir samtyktar við stuðli frá andstøðuflokkum - hetta er í Føroyum næstan líka óhugsandi, sum at hava summar í Føroyum alt árið. Vit velja nøkur fá fólk at taka allar avgerðir, og soleiðis má tað sjálvand verða, men tað er ikki altíð, at meirlutin av fólkinum heldur, at avgerðin er røtt ella at meirlutin skilir avgerðina - og tí mugu vit siga frá - ja rópa hart!.

Vit hava ofta sæð í heimssøguni, at ræðuleikar eru farnir fram av nøkrum fáum, meðan fjøldin stendur tigandi - t.d hava nøkur fá fólk í Íslandi togað alla fjøldina við niður í díkið.

Vit hava minkað um blokkstuðulin, og higartil eru upp ímóti tríggjar milliardir krónur færri komnar inn í samfelagið. Vit mugu standa við tær avgerðir, sum okkara fólkavaldu hava tikið og er neyvan rætt at hækka blokkin aftur, men okkara løgting kann inflatiónstryggja blokkin, so hann um ikki annað ikki minkar í virði.

Sjálvandi sæst tað, tá so nógvir pengar eru vekk, men skulu vit framhaldandi kunna bjóða okkara borgarum eitt gott samfelag, við teimum møguleikum sum vit kenna í dag, so er alneyðugt, at vit broyta hugburð og siga frá - ikki bara tá nakað er skeivt, men eisini tá avgerðirnar eru góðar - so okkara eftirkomarar ikki bara fara at minnast okkum, sum tann stóra tigandi fjøldin, men framhaldandi verður vælnøgda fjøldin.

## Til Landsverk

**HERI HØJSTED**

Tað undrar meg, at tað ikki skal bera til at fáa asfalt í holini millum Funning og Funningsbotn, soleiðis at tað blívur eitt sindur betur koyrandi havandi í huga, hvussu hetta økið nú hevur ligið so leingi, uttan ábøtur. Vónandi hjálpa hesar reglur til at farið verur undir at fylla í holurnar og soleiðis at betra um koyringina takk.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.